**Samsýningarpolitikkur hjá Føroya Banka samtakinum**

Føroya Banki

## 1. Inngangur og endamál

Lønarpolitikkurin hjá Føroya Banka samtakinum er galdandi fyri øll, sum starvast í samtakinum. Nevndin hevur samtykt lønarpolitikkin eftir tilmæli frá Samsýningarnevndini.

Til tess at halda viðkomandi lóggávu, hava nakrar eindir í Føroya Banka samtakinum politikkir og leiðreglur, sum galda umframt hendan lønarpolitikkin.

Lønarpolitikkurin endurspeglar markmiðnum hjá Føroya Banka samtakinum um eina skipaða og gjøgnumskygda leiðslutilgongd, og eina varðandi og langskygda virðisskapan fyri partaeigararnar.

Lønarpolitikkurin hevur umframt til endamáls at tryggja, at:

a) samtakið kann draga at sær, menna og varðveita motiveraði starvsfólk, sum avrika væl, í einum altjóða marknaði, sum merktur er av kapping

b) starvsfólkinum verður bjóðað ein kappingarfør og marknaðartillagaða løn, sum er kynsóheft

c) starvsfólk verða eggja at skapa haldfør úrslit, og at samanhangur er millum áhugamál hjá partaeigarum, viðskiftafólkum og starvsfólkum

Lønarpolitikkurin leggur herumframt dent á at tryggja eina sunna og munadygga váðastýring við at tryggja at samsvar er millum virkisskrá, virði, týdningarmiklar raðfestingar og langtíðar stevnumið hjá Føroya Banka samtakinum.

## 2. Corporate governance

Nevndin hevur gjørt leiðreglur viðvíkjandi gjøgnumgongd av og eftirliti við lønarpolitikkinum. Harumframt hevur nevndin sett eina samsýningarnevnd, sum fyrireikar arbeiðið hjá nevndini viðvíkjandi málum ið snúgva seg um lønarviðurskifti. Samansetingin av samsýningarnevndini, umframt hvørjar uppgávur og heimildir hennara eru, framgongur av arbeiðssetninginum hjá samsýningarnevndini, sum er tøk á heimasíðu bankans www.foroyabanki.com.

Tá ið nevndin heldur tað vera hóskandi, tó í minsta lagi eina ferð um árið, kannar nevndin um lønarpolitikkurin verður hildin. Verður mett at tað orsakað av broytingum ella øðrum viðurskiftum ið viðvíkja samtakinum er tørvur á at fremja tillagingar, leggur nevndin, eftir tilmæli frá samsýningarnevndini, uppskot fram um viðkomandi broytingar í lønarpolitikkinum til samtyktar á aðalfundi.

Eftir tilmæli frá samsýningarnevndini skal nevndin taka støðu til eina møguliga tillutan av variablum lønarpørtum.

## 3. Lønarsamanseting

Miðað verður eftir eisni hóskandi javnvág í lønarsamansetingum, sum fevnir um hesar lønarpartar:

- Føst løn við eftirlønarískoyti
- Variabul (úrslitatreytað) løn sum kann fevba um partabrøv, partabrævagrundað instrument, vanligar viðbótarskipanir, ómaksløn, avrikssáttmáli, viðurgjald í sambandi við starvssetan og viðurgjald fyri lýdni
- Aðrir stavsfólkaágóðar
- Møgulig fráfaringarsamsýning

Fasta lønin verður ásett við støði í starvinum og starvsuppgávunum hjá einstaka starvsfólkinum, har atlit verða tikin til millum annað royndir, ábyrgd, margfeldi í starvinum og lokal marknaðarviðurskifti.

Lønarpartar hjá starvsfólkum í samtakinum, sum eru treytaðir av úrsliti, verða einans nýttir í serligum førum, har slíkir lønarpartar sum partur av samlaðu lønarsamansetingini, verða mettir sum neyðugir til tess at fáa bestu loysnina fyri samtakið. Avgerðir um at nýta úrslitatreytaðar lønarpartar skulu í hvørjum einstøkum føri góðkennast av nevnd bankans.

## 4. Variablir/úrslitatreytaðir lønarpartar

Um so er at úrslitatreytaðir lønarpartar verða nýttir sum partur av samlaðu lønarsamansetingini, skal tryggjast at hesir eru í samsvari við vinnuvirkisskrá, virði og langtíðaræltanir samtaksins, herundir stuðla undir eitt haldgott virkismodell, og ikki forða fyri, at ein sunn og úrslitagóð váðastýring verður varðveitt.

Tá ið úrslitatreytað løn verður veitt, skulu hóskandi atlit verða tikin at váðastýring, soleiðis at lønin ikki eggjar til óskynsaman váða. Harumframt skal vera tryggjað, at tað innan fyri galdandi lóggávu er ein hóskandi javnvág er millum fastar og variablar/úrslitatreytaðar lønpartar.

Variablir/úrslitatreytaðir lønarpartar kunnu í mesta lagi svara til 50% av føstu grundlønini íroknað eftirløn. Ásetanin av variablum/úrslitatreytaðum lønarpørtum skal tryggja, at lønarstøði samtaksins samsvarar við marknaðartreytirnar. Útgjaldstíðarskeið, útgjaldsháttur og samanseting av variablum/úrslitatreytaðum lønarpørtum skal í hvørjum einstøkum føri góðkennast av nevnd bankans.

Variablir/úrslitatreytaðir lønarpartar, ið ikki eru útgoldnir, koma undir eftirkanning (back testing) og falla heilt ella lutvíst burtur, um so er, at tey úrslit, sum tillutanin er grundað á, vísa seg ikki at halda, ella um fíggjarliga støðan hjá samtakinum versnar munandi.

Fyri allar útgoldnar variablar/úrslitatreytaðar lønarpartar er galdandi, at teir kunnu krevjast afturgoldnir, um teir eru úrgoldnir grundað á upplýsingar um úrslit, sum seinni vísa seg eyðsýnliga at hava verið skeivir ella óneyvir.

Fráfaringaravtalur, sum eru galdandi frá tí at hesin lønarpolitikkur kemur í gildi, kunnu ikki fevna um variablar/úrslitatreytaðar lønarpartar.

## 5. Nevndarsamsýning

Nevnd bankans verður lønt við fastari samsýning og fær onga variabla ella úrslitatreytaðaða løn. Grundarsamsýningin hjá nevndini er á stigi, sum samsvarar við marknaðin, og sum enduspeglar krøvini, ið sett vera til førleikar hjá nevndarlimunum. Neyðugu førleikarnir hjá nevndarlimunum verða ásettir við atliti til stødd og fjøltætti samtaksins, umframt ta ábyrgd, ið nevndarlimirnir átaka sær, og tíðina, ið væntað verður, at nevndarlimir nýta til at útinna skyldur sínar sum nevndarlimir. Eftirlønarískoyti verður ikki goldið av nevndarsamsýning.

Nevndarformaðurin fær 3 x grundarsamsýning, næstformaðurin fær 2 x grundarsamsýning.

Við støði í tilmæli frá samsýningarnevndini leggur nevndin uppskot til broytingar í samsýningini til nevndarlimir fram til góðkenningar á aðalfundi.

Upplýsingar um ítøkiligu samsýningarnar til nevndarlimir bankans, umframt løn til stjórn og onnur starvsfólk, hvørs ábyrgdarøki hevur týðandi váðaávirkan, eru ávístar í ársrokniskapinum og verða harumframt almannakunngjørdar eina ferð um árið á heimasíðu bankans www.foroyabanki.com.

## 6. Løn til stjórnarlimir

Lønin til stjórnarlimir skal tryggja at Føroya Banka samtakið kann draga at sær og varðveita best skikkaðu stjornarlimirnar. Harumframt skal lønin tryggja eitt gott útveganarstøði fyri kandidatum, ið kunnu taka við seinni.

Samsýningarnevndin leggur tilmæli um broytingar í lønini til stjórnarlimir fram fyri nevndina til góðkenningar.

Løn til stjórnarlimir er sett saman av fastari løn við eftirlønarískoyt. Møgulig variabul/úrslitatreytað løn, kann einans tillutast við støði í handilsligum og virðisskapandi stevnumiðum, og undir teimum treytum, sum eru ásettar í punkt 4 í hesum lønarpolitikki.

Við støði í einsæris avtalum hava stjórnarlimir eisini rætt til virkisbil, telefon og aðrar fastar starvsfólkaágóðar. Samsýningar í sambandi við fráfaring kunnu í mesta lagi svara til tvær árslønir.

## 7. Aðrir týðandi váðatakarar

Nevndin útnevnir árliga starvsfólk, hvørs virksemi verður mett at hava týðandi ávirkan á váðastýring samtaksins. Aðrir týðandi váðatakarar verða útnevndir grundað á kvalitativ og kvantitativ krøv, sum eru nærri lýst í grein 3 og 4 í fyriskipan hjá ES-nevndini um reglubundin tøknilig aðalkrøv, viðvíkjandi tilnevnan av øðrum týðandi váðatakarum.[1]

Aðrir týðandi váðatakarar verða løntir við fastari løn við eftirlønarískoyti. Møgulig variabul/úrslitatreytað løn, kann einans tillutast við støði í handilsligum og virðisskapandi stevnumiðum, og undir teimum treytum, sum eru ásettar í punkt 4 í hesum lønarpolitikki.

---

[1] Nevndin sendi fyriskipan (ES) nr. 604/2014 út t. 4. mars 2014, har ið reglur til fyriskipan 2013/36/ES um ES-tingið og Ráðið vóru skoyttar uppí, ið snúgva seg um reglubundin tøknilig aðalkrøv fyri kvalitativ og hóskandi kvantitativ krøv viðv. samleikaprógvi hjá teimum starvsfólkum, sum hava arbeiði, ið hevur týðandi ávirkan á váðastøðið hjá stovninum.

## 8. Onnur starvsfólk

Møgulig tillutan av variablum/úrslitatreytaðum lønarpørtum til onnur starvsfólk, sum ikki eru týðandi váðatakarar, kunnu bert veitast sum ágóði í reiðum peningi ella ómaksløn. Aðrir variablir/útreiðslutreytaðir lønarpartar eru tískil valdir frá, tá ið um onnur starvsfólk ræður. Til ber tó at velja hesar til, um nevndin einmælt samtykkir tað, og hetta síðani verður samtykt á aðalfundi.